

# Dátueftirlitið

## Ársfrágreiðing 2015




# INNIHALD


1. **Fororð** 5
2. **Dátueftirlitið, Dáturáðið og skrivstovan** 8
   - 2.1 Játtanin á løgtingsfíggjarlógini 9
   - 2.2 Lógargrundarlagið 9
   - 2.3 Uppgávan hjá Dátueftirlitinum 9

3. **Virksemi í 2015** 11
   - 3.1 Eftirlit 12
   - 3.2 Hagtøl 12
   - 3.3 Munnligir fyrispurningar 15
   - 3.4 Loyvi og fráboðanir 16
     - 3.4.1 Loyvir til verkætlanir 17
     - 3.4.2 Verkætlan: Incidens af primære intrakranielle tumorer på Færøerne i perioden fra 1999-2014 17
     - 3.4.3 Verkætlan: Røktartørvurin hjá eldri fólki 17
     - 3.4.4 Verkætlan: Vón hjá palliativum sjúklingum 17
     - 3.4.5. Verkætlan: Heilsuframi av intervalvenjing hjá 50-65 ára gomlum kvinnum og monnum 18
     - 3.4.6 Verkætlan: Fólkaheilsukanningin “Hvussu hevur tú tað?” 18
     - 3.4.7 Verkætlan: Primary Carnitine Deficiency in the Faroe Islands – a study of the effect on heart and muscle in patients 18
     - 3.4.8 Verkætlan: Carnitin og kognitiv menning 18
     - 3.4.9 Verkætlan: Trivnaðarkanning millum starvsfólkini í Norðurlandahúsinum 19
     - 3.4.10 Verkætlan: Trivnaðarkanning millum starvsfólkini hjá Tórshavnar Havn 19
     - 3.4.11 Verkætlan: Í menniskjum góður tokki 19
     - 3.4.12 Aðrar verkætlanir, sum ikki hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum 19
     - 3.4.13 Ílegusavnið (fráboðaðar granskingarverkætlanir) 19
   - 3.5 Hoyringar 20
     - 3.5.1 Lógaruppskot 20
     - 3.5.2 Kunngerðir 20
     - 3.5.3 KT-politikkur 20
   - 3.6 Vegleiðingar 20

4. **Ávís útvald mál í 2015** 22
   - 4.1 Ymisk mál 22
     - 4.1.1 Dáturáðsavgerð: Lønarseðlar í Mínboks 22
     - 4.1.2 Varskógvanarskipan 22
     - 4.1.3 Greinar í Sosialinum um misnýtslu av telefonupplýsingunum 22
     - 4.1.4 Eftirlitsmál 23
     - 4.1.5 Fyrispurningur um strikan av persónsupplýsingum 23
     - 4.1.6 NemID hjá bankunum 24
     - 4.1.7 Mál um trygd í sambandi við heimasíður hjá læknum 24
     - 4.1.8 Kæra um Almannaverkið 25
     - 4.1.9 Gudstænastustroyming 25
     - 4.1.10 Luttøka á panelfundum 25
   - 4.2 Mál tikin upp av egnum ávum 26

5. **Altjóða samstarv** 28
   - 5.1 Triðjalandsgóðkenning frá ES-nevndini 28

10101 0

Við hesum letur Dátueftirlitið ársfrágreiðing sína fyri 2015 úr hondum. Ársfrágreiðing verður skrivað sambært § 37, nr. 8, í persónsupplýsingalógini og er ætlað almenninginum. Hon lýsir virksemið hjá Dátueftirlitinum í 2015.

# FORORÐ 2015

Í 2015 vórðu skrásett 181 nýggj mál. Sammett við 2014 minkaði talið av innkomnum málum 22,3 %. Teir munnligu fyrispurningarnir vóru 204 í tali. Í 2014 vóru teir 226 í tali.

Eftirlit er nú vorðið ein integreraður partur av arbeiðinum hjá Dátueftirlitinum. Í 2015 framdi Dátueftirlitið fleiri sokallað skriviborðseftirlit, t.e. eftirlit, sum ikki verða framd á staðnum, men umvegis skrivligt samskifti og fundir.

Dátueftirlitið tók eisini nógv mál upp av egnum ávum og kannaði harvið við støði í trygdarkunngerðini, t.e. kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003, heilt ella partvíst KT-trygdina hjá føroyskum stovnum og virkjum, eitt nú Føroya Tele, Vodafone, Bank Nordik, Eik Banka, Apoteksverkinum, Akstovuni, Talgildu Heilsuskipanini og Landssjúkrahúsinum.

Nøkur av hesum eftirlitsmálum eru enn til viðgerðar hjá Dátueftirlitinum.

Árið 2015 á Dátueftirlitinum var annars í stóran mun merkt av, at eldraøkið tann 1. januar 2015 varð latið kommununum at umsita.

Kommunurnar eru í hesum sambandi skipaðar í sjey samstarvsøki, og aftur at hesum kemur Tórshavnar kommuna. Dátueftirlitið vendi sær í desember 2014 til tey sjey samstørvini og Tórshavnar kommunu við fyrispurningi um, hvussu eldraøkið nú skuldi skipast við atliti at KT-trygd. Samstørvini vórðu eisini kunnað um, at tey skuldu lata Dátueftirlitinum umsókn um loyvi at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar. Í 2015 hevur Dátueftirlitið sostatt viðgjørt umsóknir frá øllum teimum sjey samstørvunum hesum viðvíkjandi.

Treytin, fyri at fáa hesi viðgerðarloyvi, er, at KT-trygdin og mannagongdirnar fyri handfaring av viðkvomum persónsupplýsingum eru í samsvari við persónsupplýsingalógina og trygdarkunngerðina. Hetta hevur kravt nógv bæði av samstørvunum og Dátueftirlitinum, tí KT-trygdin var ikki fingin í fasta legu, tá ið økið varð yvirtikið. Hesi mál vórðu ikki endaliga avgreidd í 2015.

Føroyar fingu í 2010 triðjalandsgóðkenning frá ES við atliti at flutningi av persónsupplýsingum tvørtur um landamørk. Góðkenningin ber í sær, at Føroyar koma á yvirlitið yvir trygg triðjalond, og at ES metir Føroyar vera eitt land, sum verjir grundleggjandi fólkaræðislig rættindi í einum nútímans talgildum samfelag. Góðkenningin setur størri krøv til eftirlitið hjá Dátueftirlitinum við KT-trygdini í Føroyum.

Í desember 2015 samtykti ES eina nýggja fyriskipan fyri persónsupplýsingarættin í limalondunum. Enn er ikki greitt, hvørjar broytingar hetta ber í sær fyri persónsupplýsingarættin í limalondunum og

# FORORÐ 2015

Føroyum, men greitt er, at Føroyum eisini í framtíðini tørvar góðkenning sum trygt triðjaland.

Danska løgmálaráðið hevur sett ein bólk av serkønum at seta út í kortið, hvussu persónsupplýsingarætturin í Danmark skal skipast, tá ið ES-fyriskipanin eftir ætlan fær gildi á vári/sumri í 2018.

Dátueftirlitið verður við á teimum seminarum og ráðstevnum, sum koma í kjalarvørrinum á teirri nýggju ES-fyriskipanini fyri persónsupplýsingaøkið. Tað er sera týdningarmikið at ansa eftir, at tann føroyska persónsupplýsingalógin alsamt verður soleiðis háttað, at vit varðveita ta triðjalandsgóðkenning, vit hava fingið frá ES. Tí fer Dátueftirlitið hetta til summarið 2018 at fylgja væl við og arbeiða fyri, at møguligar lógarbroytingar, sum krevjast í mun til triðjalandsgóðkenningina, verða framdar í Føroyum. Í tann mun tann nýggja ES-fyriskipanin krevur tað, fer Dátueftirlitið at mæla Løgmansskrivstovuni til at gera ítøkiligar tillagingar í persónsupplýsingalógini.

Tórshavn, juni 2016

Eyðbjørn M. Larsen
*Formaður í Dáturáðnum*

Eyðhild Skaalum
*Stjóri í Dátueftirlitinum*

# 2 Dátueftirlitið, Dáturáðið og skrivstovan

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki, og avgerðir hjá stovninum eru endaligar í fyrisitingini. Dátueftirlitið hevur fíggjarligt tilknýti til Løgmansskrivstovuna, men er óheft í sínum virksemi.

Dátueftirlitið vísir til Løgmansskrivstovuna, tá um játtan og lógarsmíð ræður. Løgmaður hevur fyrisitingarheimild, men kann ikki geva Dátueftirlitinum tænastuboð, sí málsøkjafráboðanina og persónsupplýsingalógina.

Dátueftirlitið umsitur løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004. Lógin verður vanliga nevnd persónsupplýsingalógin.

Dátueftirlitið er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, og tess avgerðir eru sambært lógini fyrisitingarliga endaligar.



Dátueftirlitið hevur virkað síðan tann 1. januar 2002, tá ið persónsupplýsingalógin kom í gildi. Dátueftirlitið er skipað við einum Dáturáði, sum løgmaður og skrivstovan velja. Limirnir í Dáturáðnum verða valdir persónliga. Formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri fýra ár í senn. Varalimir verða somuleiðis valdir fyri fýra ár.

Landsstýrismaðurin í innlendismálum, sum tá varðaði av Dátueftirlitinum, valdi tann 1. november 2012 nýggjar limir í Dáturáðið. Samstundis vórðu varalimir valdir.

**Í Dáturáðnum sita:**
Eyðbjørn M. Larsen, advokatur, formaður.
*Rannvá Sólheim varalimur, løgfrøðingur*
Óli Simonsen, KT-leiðari.
*Ólavur Ellefsen varalimur, stjóri*
Katrin Kallsberg, serlækni
*Maria Dam varalimur, deildarleiðari*

Valskeiðið hjá Dáturáðnum er fýra ár og endar tann 1. november 2016.

Í september 2015 varð Katrin Kallsberg vald á Føroya Løgting. Sambært stýrisskipanarlógini § 8 skal løgtingslimur siga frá sær størv í ráðum, nevndum o.t., tá ið tingið hevur góðkent valið. Tí skuldi nýggjur dáturáðslimur tilnevnast fyri Katrina Kallsberg. Í oktober 2015 valdi Løgmansskrivstovan Mariu Dam, deildarleiðara, granskara á Umhvørvisstovuni og varalim í Dáturáðið fyri Katrina Kallsberg. Rudi Kollslíð, lækni, varð vald sum varalimur.

**Skrivstovan:**
Á skrivstovuni starvast trý fólk: ein stjóri, ein løgfrøðingur og ein skrivari.

Dátueftirlitið heldur til í egnum skrivstovuhølum. Bústaðurin er Reyngøta 33, Tinganes.



Dátueftirlitið

## 2.1. JÁTTANIN Á LØGTINGSFÍGGJARLÓGINI

Játtanin hjá Dátueftirlitinum á løgtingsfíggjarlógini fyri 2015 var 2.000.000 kr.

Niðanfyri er fíggjarjáttanin hjá Dátueftirlitinum árini 2013-2015 útgreinað.

## 2.2. LÓGARGRUNDARLAGIÐ

**Í 2015 vóru hesar reglur galdandi:**

- Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004, (Persónsupplýsingarlógin).
- Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, (Trygdarkunngerðin).
- Kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum.
- Kunngerð nr. 124 frá 19. september 2011 um fráboðanarskyldu og undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.
- Reglugerð fyri Dáturáðið, dagfest 14. juni 2007.
- Innanhýsis roknskaparreglugerð, góðkend av Løgmansskrivstovuni hin 30. januar 2014.

## 2.3. UPPGÁVAN HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er at umsita persónsupplýsingarlógina. Sambært § 37 í lógini skal Dátueftirlitið:

- av egnum ávum ella eftir klagu frá tí skrásetta ansa eftir, at persónsupplýsingar verða viðgjørdar í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini
- viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild
- hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini
- ummæla ætlaða lóggávu viðvíkjandi persónsupplýsingum
- gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar
- vegleiða privat og tað almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði
- fylgja við í og kunna um gongdina í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum her á landi og uttanlands
- gera ársfrágreiðing

Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum skal tryggja, at reglurnar í persónsupplýsingalógini verða hildnar. Stovnurin hevur víðar heimildir í hesum sambandi.

Dátueftirlitið hevur heimild at gera kanningar á staðnum og hevur til eina og hvørja tíð, uttan dómsúrskurð, atgongd til øll høli, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar, goymdar ella nýttar, og har teknisk hjálparamboð verða nýtt.

Brot á lógina kunnu verða revsað sambært §§ 44 og 45 í persónsupplýsingalógini.

**Fíggjarjáttanin hjá Dátueftirlitinum árini 2013 - 2015**

| *Sundurgreinað ætlan* Tús. kr. | 2013 J | 2014 J | 2015 J |
|---|---|---|---|
| **Nettoútreiðslujáttan** | **2.000** | **2.000** | **2.000** |
| Lønir o.a. | 1.640 | 1.640 | 1.640 |
| Keyp av vørum og tænastum | 270 | 270 | 270 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 80 | 80 | 80 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 10 | 10 | 10 |

:// Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tøkniliga menningin gongur skjótt fyri seg, og stinga nýggir trupulleikar og øki seg javnan upp.

01010 1



# 3 Virksemi í 2015

Í 2015 hevur Dátueftirlitið m.a.:

- viðgjørt loyvisumsóknir og fráboðanir
- vegleitt og ráðgivið almennum myndugleikum, fyritøkum og privatpersónum
- viðgjørt kærur um viðgerð av persónsupplýsingum
- framt skrivborðseftirlit og sett stovnum og fyritøkum fyrispurningar um KT-trygd
- svarað munnligum og skrivligum fyrispurningum
- ummælt uppskot til nýggja lóggávu
- tikið mál upp av egnum ávum
- havt framløgu á ráðstevnu og hátíðarhaldi

Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tann tøkniliga menningin gongur skjótt og nýggir trupulleikar og øki javnan stinga seg upp. Tí er neyðugt at menna nýggjar mannagongdir á økinum og í tí sambandi at fylgja væl við gongdini í grannalondunum.

Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar, og málsviðgerðin er fjøltáttað. Harumframt er økið í vøkstri og støðugari broyting. Tí er stórur tørvur á, at Dátueftirlitið við upplýsing og vegleiðing virkar fyri, at persónsupplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði.

Fyrispurningar kunnu snúgva seg um nógv ymiskt, men summir eru afturvendandi. Í 2015 hava afturvendandi fyrispurningar serliga snúð um hesi evni:

- P-talið
- KT-trygd
- Innlit
- Hvussu arbeiðsgevarar handfara teldupostkassan hjá starvsfólki, sum er farið úr starvi
- Facebook og onnur sosial netverk
- At strika myndir og filmar á netinum
- At koyra ymiskar skipanir saman
- Telefonsamskifti hjá starvsfólki
- Loyvir til verkætlanir og ymiskar nøgdsemis- og heilsukanningar
- Vakmyndatól

Dátueftirlitið fær nógvar fyrispurningar frá borgarum í Føroyum um teir sosialu netmiðlarnar. Tað eru bæði børn, ung og vaksin, sum venda sær til Dátueftirlitið um telefonina ella teldupost at leita sær ráð og vegleiðing. Í flestum førum snúgva fyrispurningarnir seg um trupulleikar á Facebook, har ein stórur partur av borgarunum í Føroyum hevur vangamynd. Spurt verður eitt nú, hvørjar myndir kunnu leggjast á netið, nær samtykki krevst til at almannakunngera myndir, og hvussu falskar vangamyndur kunnu meldast. Dátueftirlitið fær eisini javnan áheitanir um vegleiðing í sambandi við at melda sonevndar slaturbólkar á Facebook. Eisini er tað ein afturvendandi trupulleiki, at fólk kenna seg útspilt og ærumeidd á Facebook. Hóast teir flestu fyrispurningar snúgva seg um Facebook, eru eisini fyrispurningar um t.d. Instagram og Snapchat, og stundum verða falskar vangamyndir gjørdar á ymsum datingsíðum.

Fyri at veita hesum borgarum, sum biðja um vegleiðing í sambandi við teir sosialu miðlarnar, góða tænastu, gjørdi Dátueftirlitið fyri nøkrum árum síðan eina nýggja heimasíðu við heitinum “strikameg.fo”. Endamálið var at geva borgaranum atgongd til vegleiðingarnar hjá Dátueftirlitinum, soleiðis at hann sjálvur kann leita sær ráð og finna kunning. Eitt nú um rættan framferðarhátt, tá ið ein bólkur skal meldast ella ein vangamynd strikast.




Dátueftirlitið fær eisini javnan skrivligar fyrispurningar frá næmingum úr føroyskum skúlum. Vanliga er talan um fólkaskúlanæmingar, sum skriva uppgávu og spyrja Dátueftirlitið um nýtslu og misnýtslu av alneti og sosialum miðlum.

## 3.1. EFTIRLIT

Í 2015 framdi Dátueftirlitið 18 skriviborðseftirlit. Dátueftirlitið raðfesti sínar uppgávur soleiðis, at eftirlitið setti seg í samband við nógvar stovnar og fyritøkur fyri at kanna, um KT-trygd og mannagongdir í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum vóru í samsvari við persónsupplýsingalógina og trygdarkunngerðina. Orsøkin til raðfestingina var, at Dátueftirlitið hevði vitan um, at tað støðugt er neyðugt at gera dátuábyrgdarar varugar við krøvini, sum lógin og kunngerðin seta til handfaringina av persónsupplýsingum og í mongum førum hevur verið neyðugt at áleggja dátuábyrgdarum at seta umfatandi tiltøk í verk fyri at fáa viðgerðina av persónsupplýsingum í lógliga legu. Dátueftirlitið ásannar, at hesin arbeiðsháttur er komin fyri at vera, og at hann er eitt vælegnað amboð til at loysa tær uppgávur, sum tað eru álagdar stovninum.

## 3.2. HAGTØL

Upplýsingarnar í hesum partinum av ársfrágreiðingini eru grundaðar á skrásetingina av nýggjum málum í journalskipanini hjá Dátueftirlitinum fyri 2015. Upplýsingarnar viðvíkja sostatt bara nýggjum málum. Ein stórur partur av málunum hjá Dátueftirlitinum fevnir um framhald av gomlum málum, t.d. broytingar í givnum loyvum ella fráboðanum. Hesi mál eru ikki tikin við í hetta yvirlitið, sum bara snýr seg um mál, sum eru stovnað í 2015.

Virksemi í 2015

MYND 1. Bólking av málum 2009 - 2015

Í mun til í fjør, er talið av innkomnum málum lækkað og er lækkingin 22,3 %.
Mynd 1 niðanfyri vísir talið av málum og munnligum fyrispurningum frá 2009 til og við 2015.




MYND 2. Bólking av nýstovnaðum málum í 2015 í tølum



## MYND 3. Málsbýti í prosentum í mun til myndugleikar, fyritøkur o.t. 2014/2015

Á mynd 3 sæst, at tað í stóran mun eru almennir myndugleikar, privatar fyritøkur og privatpersónar, sum venda sær til Dátueftirlitið.




| Í 2014 vóru tølini hesi: | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar, stovnar o.t. | 78 |
| Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t. | 37 |
| Privatpersónar | 30 |
| Kommunur | 13 |
| Fjølmiðlar | 3 |
| Innanhýsis | 19 |
| Annað | 1 |
| Íalt | 181 |

## MYND 4. Málsbýti í mun til evnisbólkar

Á mynd 4 sæst, hvussu málini eru býtt upp í teir ymsu evnabólkarnar.




| Málini kunnu í høvuðsheitum býtast upp á hesar evnisbólkar: | |
|---|---|
| Vakmyndatól | 25 |
| Gransking | 27 |
| Starvsfólkaviðurskifti | 3 |
| Kt-trygd | 12 |
| Sosialar netsíður | 9 |
| Ummæli/hoyring | 8 |
| P-tøl | 5 |
| Eftirlit | 18 |
| Mál viðvíkjandi lógini generelt | 36 |
| Innanhýsis mál | 19 |
| Upplýsing og fyribyrging | 9 |
| Innlit | 3 |
| Annað | 7 |
| Íalt | 181 |



## 3.3. MUNNLIGIR FYRISPURNINGAR

Í 2007 fór Dátueftirlitið undir at skráseta munnligar fyrispurningar, sum vórðu avgreiddir um telefonina. Í hesum bólki eru bara skrásettir fyrispurningar, har borgarar ella myndugleikar hava fingið beinleiðis vegleiðing um telefonina; ikki samskifti í sambandi við verandi ella komandi mál.

Í 2015 vórðu 204 munnligir fyrispurningar skrásettir. Á myndini niðanfyri sæst, hvussu teir munnligu fyrispurningarnir, sum vóru avgreiddir í 2015, kunnu bólkast.

## MYND 5. MUNNLIGIR FYRISPURNINGAR




| Málsbýti í mun til myndugleikar, fyritøkur, privatpersónar, kommunur og advokatar: | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar, stovnar o.t. | 66 |
| Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t. | 51 |
| Privatpersónar | 55 |
| Kommunur | 22 |
| Fjølmiðlar | 10 |
| Íalt | 204 |

***Almennir myndugleikar, stovnar o.t.***

Fyrispurningarnir í hesum bólki hava serliga verið um, nær og hvussu ymisk skráseting er loyvd, nær talan er um viðkvæmar persónsupplýsingar, og nær tað er loyvt sambært persónsupplýsingalógini at lata persónsupplýsingar víðari. Í einstøkum førum hevur talan verið um skúlar, sum hava vent sær til Dátueftirlitið við spurningum um myndir og videobrot á netinum. Millum teir afturvendandi spurningarnar frá teimum almennu myndugleikunum eru spurningar um reglurnar fyri nýtslu av p-talinum, samankoyring av upplýsingum í ymsum skráum, innlit og starvsfólkaskráseting. Fyrispurningarnir í sambandi við starvsfólkaskráseting hava ofta snúð seg um, hvussu, ella undir hvørjum umstøðum og treytum, ein arbeiðsgevari fær atgongd at ymiskum upplýsingum um síni starvsfólk. Talan kann t.d. vera um upplýsingar í teldupostsskipanini hjá einum starvsfólki og loggur frá heimasíðuvitjanum. Talan kann eisini vera um at fáa atgongd at starvsfólkaupplýsingum hjá starvsfólkum, sum eru í starvi, í sambandi við uppsagnartilgongd og hjá starvsfólkum, sum eru farin úr starvi.

***Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t.***

Teir flestu fyrispurningar frá privatum fyritøkum í 2015 snúðu seg um vakmyndatól og nýtsluna av teimum. Eisini hava nógvir fyrispurningar verið um p-talið. Spurt hevur verið, nær p-talið kann nýtast. Nógvir fyrispurningar hava verið frá arbeiðsgevarum um handfaring av persónsupplýsingum í starvsfólkaviðurskiftum. Arbeiðsgevarar hava eitt nú viljað vitað, hvørjar reglur eru galdandi í sambandi við eftirkanning av heimasíðunýtslu hjá starvsfólki, innlit í teldupostssamskifti hjá

starvsfólki, nýtslu av sosialum netmiðlum o.s.fr.. Ein partur av hesum fyrispurningum um viðurskifti millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara hevur snúð seg um handfaring av persónsupplýsingum, tá ið starvsfólk eru farin úr starvi.

***Privatpersónar***

Teir flestu fyrispurningarnir frá privatum borgarum hava snúð seg um ymisk viðurskifti viðvíkjandi sosialum netmiðlum. Eitt nú hevur verið spurt, hvussu ein bólkur ella ein følsk vangamynd verður meldað, og hvussu vangamyndin hjá einum deyðum brúkara verður strikað. Nógv teir flestu fyrispurningarnir viðvíkjandi sosialum netmiðlum hava snúð seg um Facebook. Nógvir fyrispurningar frá privatum borgarum hava somuleiðis snúð seg um p-talið og nær ein dátuábyrgdari hevur rætt til at skráseta tað. Harafturat hava nógvir fyrispurningar snúð seg um granskingarverkætlanir og um at fáa viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Fyrispurningar hava eisini verið frá persónum, sum eru farnir úr starvi og vilja vita, um arbeiðsgevarin kann nýta tilfar og upplýsingar, sum liggja í teldupostsskipanini. At enda hava nakrir fyrispurningar snúð seg um vakmyndatól á arbeiðsplássinum, eitt nú nær, og undir hvørjum treytum, tað er loyvt at nýta vakmyndatól.



***Kommunur***

Fyrispurningarnir frá kommunum í 2015 hava í høvuðsheitum snúð seg um nýtslu av p-tølum hjá borgarum. Kommunurnar hava viljað vitað, um, og undir hvørjum treytum, p-talið kann skrásetast. Eisini hava onkrir fyrispurningar snúð seg um at lata persónsupplýsingar víðari og undir hvørjum treytum hetta kann gerast.

***Miðlar***

Fleiri fyrispurningar eru eisini komnir frá fjølmiðlum í 2015. Tað hava verið spurningar frá tíðindabløðunum, internetportalum, útvarpi og sjónvarpi um ymisk viðurskifti. Miðlarnir vendu sær til Dátueftirlitið viðvíkjandi eitt nú logging, sosialum netmiðlum, flutningi av upplýsingum av landinum, skráseting og vakmyndatólsupptøkum.

## 3.4. LOYVI OG FRÁBOÐANIR

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Dátueftirlitinum sambært § 37 í persónsupplýsingalógini er at viðgera loyvisumsóknir og fráboðanir.

***Viðgerðarloyvi:***

Við einum viðgerðarloyvi gevur Dátueftirlitið einum stovni, felag, persóni ella øðrum loyvi at viðgera ávísar viðkvæmar persónsupplýsingar til eitt ávíst endamál og undir ávísum treytum. Viðgerðarloyvir eru vanliga tíðaravmarkað. Søkt verður við at fylla eitt oyðublað út á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum og senda tað inn um heimasíðuna ella við postinum. Yvirhøvur krevst loyvi frá Dátueftirlitinum at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar. Tó eru undantøk. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru upplýsingar um húðarlit og ættarslag, átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiska sannføring, revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti. Í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi eru ásett ymisk undantøk til reglurnar um viðgerðarloyvi.

***Fráboðan:***

Hóast viðgerðarloyvi ikki krevst til eina viðgerð av viðkvomum persónsupplýsingum, skal Dátueftirlitið hava fráboðan um viðgerðina. Dátueftirlitið skal hava eina frágreiðing um, at tann, sum boðar frá, ætlar at viðgera ávísar persónsupplýsingar. Boðað verður frá við at fylla eitt oyðublað (fráboðanarskjal) út á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum og senda tað inn um heimasíðuna ella við postinum. Fráboðanin skal vera Dátueftirlitinum í hendi í seinasta lagi 30 dagar áðrenn viðgerðin er ætlað at byrja. Ein kunngerð er gjørd við undantøkum til fráboðanarskylduna. Kunngerðin ber í høvuðsheitum í sær, at Dátueftirlitið ikki skal hava fráboðan um viðgerð av persónsupplýsingum, sum ikki eru viðkvæmar. Flestu fráboðanirnar, sum Dátueftirlitið hevur fingið í 2015, hava verið umsóknir um viðgerðarloyvir og fráboðanir.

Sambært persónsupplýsingarlógini § 37, skal Dátueftirlitið hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir.

### 3.4.1. Loyvi til verkætlanir

Dátueftirlitið hevur í 2015 givið loyvi til ymiskar verkætlanir. Nevnast kunnu:

### 3.4.2. Verkætlan:
### Incidens af primære intrakranielle tumorer på Færøerne i perioden fra 1999-2014

**Dátuábyrgdari:** Landssjúkrahúsið (Jan Rasmussen)



**Endamál:** At kanna primerar intrakraniellar tumorar í Føroyum í tíðarskeiðnum 1994 til 2014.

**Háttur:** Upplýsingarnar verða savnaðar úr Talgildu Heilsuskipanini.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til tann 31. mai 2015.

### 3.4.3. Verkætlan:
### Røktartørvurin hjá eldri fólki

**Dátuábyrgdari:** Eina Hansen Eliasen

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er sambært umsóknini at samanbera røktartørvin á bygd og í bý hjá eldri fólki í Føroyum í aldrinum 79, 80 og 81 ár.

**Háttur:** Upplýsingarnar verða savnaðar við samtykki frá teimum skrásettu.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til tann 30. juni 2015.

### 3.4.4. Verkætlan:
### Vón hjá palliativum sjúklingum

**Dátuábyrgdari:** Kristianna Hammer

**Endamál:** Ein kvalitativ kanning - at lýsa vón, tá ið ein í familjuni hevur ólekjandi krabbamein.

**Háttur:** Upplýsingarnar verða savnaðar frá teimum skrásettu persónunum við spurnablaði.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til tann 31. desember 2015.

3.4.5. Verkætlan:
Heilsuframi av intervalvenjing hjá 50-65 ára gomlum kvinnum og monnum

**Dátuábyrgdari:** Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (Pál Weihe)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er sambært umsóknini at kanna, hvussu kropslig venjing, t.e. fótbóltur, ávirkar hjartað, æðralagið, evnaskiftið og tættleikan í beinagrindini hjá fólki við einum sukurevnaskifti, sum er at meta sum eitt undanstig til sukursjúku.

**Háttur:** Upplýsingarnar verða savnaðar manuelt við samtykki frá tí skrásetta.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til juni 2016.



3.4.6. Verkætlan:
Fólkaheilsukanningin "Hvussu hevur tú tað?"

**Dátuábyrgdari:** Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (Pál Weihe)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er sambært umsóknini at gera eina spurnakanning, sum miðar eftir at kanna trivnað, heilsu og sjúku hjá 5.000 vaksnum fólkum í Føroyum.

**Háttur:** Upplýsingarnar verða savnaðar manuelt við samtykki frá tí skrásetta.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til tann 31. januar 2016.

3.4.7. Verkætlan:
Primary Carnitine Deficiency in the Faroe Islands – A Study of the Effect on Heart and Muscle in Patients

**Dátuábyrgdari:** Landssjúkrahúsið (Jan Rasmussen)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er sambært umsóknini at kanna hjartafunktión hjá CTD-sjúklingum við hjarta-MR. Hetta fyri at fáa betri kunnleika um sjúkugongd hjá CTD-sjúklingum.

**Háttur:** Upplýsingarnar verða savnaðar frá tí skrásetta.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til tann 30. september 2017.

3.4.8. Verkætlan:
Carnitin og kognitiv menning

**Dátuábyrgdari:** Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (Pál Weihe)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er sambært umsóknini at kanna, um samband er ímillum nøgdina av carnitini í blóðinum og kognitiva menning.



**Háttur:** Upplýsingarnar verða savnaðar manuelt við samtykki frá teimum skrásettu.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til tann 31. desember 2017.

3.4.9. Verkætlan:
Trivnaðarkanning millum starvsfólkini í Norðurlandahúsinum

**Dátuábyrgdari:** J. Herluf Sørensen

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er at lýsa arbeiðsumhvørvið í Norðurlanda-húsinum, har starvsfólk svara spurnablaði.

**Háttur:** Upplýsingarnar verða savnaðar manuelt við samtykki frá teimum skrásettu.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til 28. september 2015.

3.4.10. Verkætlan:
Trivnaðarkanning millum starvsfólkini hjá Tórshavnar Havn

**Dátuábyrgdari:** J. Herluf Sørensen

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er at lýsa arbeiðsumhvørvið hjá Tórshavnar Havn, har starvsfólk svara spurnablaði.



**Háttur:** Upplýsingarnar verða savnaðar manuelt við samtykki frá teimum skrásettu.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til tann 22. november 2015.

3.4.11. Loyvi:
Átakið "Í menniskjum góður tokki"

**Dátuábyrgdari:** Annlis Bjarkhamar

**Endamál:** Átakið "Í menniskjum góður tokki" hevur til endamáls at veita fólki í fíggjarligari trongstøðu fíggjarligan stuðul at halda jól fyri.

**Háttur:** Søkt verður um stuðul við at senda dátuábyrgdaranum bræv ella við at ringja. Til ber eisini at søkja um heimasíðuna www.takk.fo.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til tann 10. desember 2015.

3.4.12. Aðrar verkætlanir, sum ikki hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum
Dátueftirlitið hevur í 2015 eisini viðgjørt aðrar verkætlanir, har niðurstøðan hevur verið, at loyvi ikki hevur kravst frá Dátueftirlitinum. Talan hevur verið um verkætlanir, har tað ikki hevur verið møguligt at eyðmerkja persónar, og verkætlanir, har viðkvæmar persónsupplýsingar ikki hava verið viðgjørdar.

3.4.13. Ílegusavnið
(Fráboðaðar granskingarverkætlanir)
Ílegusavnið varð sett á stovn við løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum (ílegulógin). Sambært §§ 3-5 og

7 í ílegulógini hevur Ílegusavnið lógarheimild at stovna og reka vevnaðardiagnosu og ættarbandsskránna og í hesum sambandi at gera sáttmálar um gransking.

Av tí at Ílegusavnið sostatt hevur hesa lógarheimild, krevst einki viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Hetta kemst av reglunum í § 3, nr. 3, í kunngerð nr. 124 frá 19. september 2011 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi, men Dátueftirlitið skal tó hava fráboðan um verkætlanirnar sambært § 32 í persónsupplýsingalógini. Í svari upp á ítøkiligan fyrispurning frá Ílegusavninum hevur Dátueftirlitið mett, at tað ikki ber til at gera eina fráboðan, sum bæði fevnir um ta generellu skipanina og verkætlanir sum heild. Orsøkin er, at viðgerðirnar eru ymiskar í mun til § 34 í persónsupplýsingalógini. Sostatt skal Dátueftirlitið í hvørjum einstøkum føri hava fráboðan um verkætlanirnar, og granskararnir skulu síðani sjálvir venda sær til Dátueftirlitið við ítøkiligu verkætlanini.

***Í 2015 hevur Ílegusavnið boðað frá hesum verkætlanum:***

- Susceptibility and Outcome in Invasive Meningococcal Disease in a Genetically Homogenious Population (MeFcocc study)
- Pilotprojekt – Genealogisk udredning af amyotrofisk lateral sklerose (ALS) på Færøerne
- Pilotprojekt – Demens på Færøerne
- Grønstar (glaukom) í føroyska fólkinum
- Defining the Genetic Etiology of Dementia/ Alzheimer's Disease in the Faroe Islands
- Multifactoral Modelling of Parkinson's Disease in the Faroe Islands

## 3.5. HOYRINGAR

### 3.5.1. Lógaruppskot

Í 2015 hevur Dátueftirlitið havt hesi lógaruppskot til hoyringar:

- Uppskot til løgtingslógir um val til løgtingið og val til kommunur
- Uppskot um løgtingslóg um rættin hjá P/F Vága Floghavn at krevja inn parkeringsgjald
- Uppskot til nýggja fjarskiftislóg
- Uppskot til løgtingslóg um skúladeplar

### 3.5.2. Kunngerðir

Dátueftirlitið hevur í 2015 havt hesar kunngerðir til ummælis:

- Uppskot til kunngerð um atkvøðugreiðslu, tá ið skúli verður afturlatin
- Bekendtgørelse om registrering af aktiver m.v. til dækning af særligt dækkende obligationer
- Uppskot til kunngerð um tænastugjøld

### 3.5.3. KT-politikkur

Almennir myndugleikar hava í 2015 vent sær til Dátueftirlitið við fyrispurningum um ymiskt í sambandi við KT-trygd og KT-politikk yvirhøvur. Dátueftirlitið hevur í hesum sambandi kannað, um KT-politikkurin er í samsvari við persónsupplýsingalóggávuna, og annars vegleitt um ymisk viðurskifti.

## 3.6. Vegleiðingar

Dátueftirlitið leggur stóran dent á at framleiða vegleiðingar fyri tey ymisku økini. Hetta er ein liður í tí fyribyrgjandi arbeiðinum. Á heimasíðuni www.dat.fo eru allar vegleiðingarnar at finna.

:// Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar, og málsviðgerðin er fjøltáttað.



# 4 Útvald mál í 2015

## 4.1. YMISK MÁL

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini er ein stutt lýsing av einstøkum útvaldum málum í 2015.

### 4.1.1. Dáturáðsavgerð: Lønarseðlar í Mínboks

Hetta mál snúði seg um, at Føroya Gjaldstova sendi allar lønarseðlar og persóntal hjá løntakarunum til Mínboks, sum er eitt sjálvstøðugt partafelag.

Viðurskiftini millum Mínboks og einstaka brúkaran eru ásett í serligari avtalu millum partarnar. Av hesari avtalu framgongur, at brúkarin, tá hann stovnar sær Mínboks, gevur sítt samtykki til, at Mínboks kann viðgera hansara persónsupplýsingar, heruppií p-talið.

Tað eru tó ikki allir løntakarar, ið hava stovnað sær Mínboks. Hesir hava tí ikki givið sítt samtkki til, at Mínboks kann viðgera teirra persónsupplýsingar. Av somu orsøk hevur Mínboks onga heimild til at viðgera hesar, og dáturáðsavgerðin frá 24. apríl 2015 sigur tí, at Føroya Gjaldstova onga heimild hevur til at lata Mínboks persónsupplýsingar, heruppií p-tal hjá hesum løntakarum.

Føroya Gjaldstova er dátuábyrgdari av teimum persónsupplýsingum (navn, føðidato, p-tal, kontonr.), sum løntakararnir lata Føroya Gjaldstovu í samband við rindan av løn.

Føroya Gjaldstova hevur ikki harvið fingið heimild til at lata hesar persónsupplýsingar víðari til Mínboks.

Til tess krevst samtykki frá løntakarunum, og hetta samtykki hava bert teir løntakarar givið, sum hava skrásett seg sum brúkarar í Mínboks.

Avgerðin hjá Dáturáðnum er tí, at lønarseðlar hjá teimum løntakarum, ið ikki hava stovnað sær Mínboks, skulu vera verðandi hjá Føroya Gjaldstovu og ikki sendast Mínboks, fyrr enn løntakarin hevur skrásett seg sum brúkara í Mínboks.

Dáturáðsavgerðin frá 15. mars 2015 var ein staðfesting av teirri avgerð, sum Dátueftirlitið tók í málinum, hin 26. mars 2015.



### 4.1.2. Varskógvanarskipan

Varskógvanarskipan fyri bankar í Føroyum varð sett í gildi við lóg tann 1. juli 2015.

Lógin ásetur, at bankar skulu boða Dátueftirlitinum frá varskógvanarskipanum.

Dátueftirlitið gjørdi eitt serligt oyðublað til hesa fráboðanina. Oyðublaðið varð lagt út á heimasíðuna hjá Dátueftirlitinum. Bankarnir søktu síðani Dátueftirlitið um loyvi til at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar í sambandi við varskógvanarskipanir. Dátueftirlitið viðgjørdi síðan fráboðanirnar frá bankunum, sum nú allir hava fingið loyvi til hesa viðgerð.







### 4.1.3. Greinar í Sosialinum um misnýtslu av telefonupplýsingum

Tann 13. februar 2015 stóðu ymsar greinar í Sosialinum, har m.a. nøkur starvsfólk hjá teimum báðum telefeløgunum í Føroyum greiddu frá, at tey høvdu atgongd at upplýsingum um, hvussu kundarnir ferðaðust á netinum, umframt telefon- og sms-upplýsingum hjá kundunum. Eitt nú bar til hjá starvsfólki at leita eftir einum navni ella telefonnummari og síggja allar upplýsingar á telefonini. Tann, sum leitaði, sá, hvønn tosað hevði verið við, og hvussu langar samrøðurnar høvdu verið. Eisini sást, hvørjum kundarnir høvdu fingið sms-boð frá, og hvørjum teir høvdu sent sms-boð.

Greinarskrivarin hevði sett seg í samband við stjórarnar á telefeløgunum, sum báðir játtaðu, at ávís starvsfólk høvdu atgongd at teimum nevndu upplýsingunum. Teir hildu tó báðir, at eftirlitið við starvsfólkunum var nøktandi.

Greinarskrivarin hevði sett seg í samband við Dátueftirlitið og fingið viðmerkingar frá stjóranum á Dátueftirlitinum. Viðmerkingarnar vórðu prentaðar í sama blaði.

Dátueftirlitið tók málið til viðgerðar.

### 4.1.4. Eftirlitsmál

Í sambandi við eina grein í einum av bløðunum, sum endurgav dulnevnd starvsfólk, sum høvdu latið blaðnum upplýsingar um, hvussu ymiskir stovnar og fyritøkur viðgjørdu persónsupplýsingar, bað Dátueftirlitið stovnarnar greiða frá, um teir luku § 8, stk. 1, í trygdarkunngerðini, sum ásetur, at starvsfólk hjá einum dátuábyrgdara bara skulu nýta upplýsingakervið til at útinna álagdar arbeiðsuppgávur, og í játtandi føri greiða nærri frá teirri skipan, sum stovnarnir høvdu.

Dátueftirlitið spurdi eisini stovnarnar, hvørji trygdartiltøk teir høvdu sett í verk ella ætlaðu at seta í verk hesum viðvíkjandi.

Dátueftirlitið heitti á stovnarnar um at senda sær avrit av teimum reglum og mannagongdum, sum stovnarnir høvdu sett í verk við atliti at nýtslu av upplýsingakervunum hjá stovnunum.

Hetta hevur elvt til samskifti við umrøddu stovnar og fyritøkur og í nøkrum førum til nærri eftirlit (skriviborðseftirlit).

Nøkur av teimum umrøddu málum eru enn til viðgerðar hjá Dátueftirlitinum. Dátueftirlitið krevur, at KT-trygdarpolitikkur, mannagongdir sambært trygdarkunngerðini og trygdarskoðan verða sett í verk, áðrenn staðfest verður, at viðgerðin av persónupplýsingum er nøktandi og samsvarandi ásetingunum í persónsupplýsingalógini og trygdarkunngerðini.

### 4.1.5. Fyrispurningur um strikan av persónsupplýsingum

Í sambandi við eftirlitsarbeiði, har Dátueftirlitið spurdi um mannagongdir við atliti at strikan av persónsupplýsingum, svaraðu summir landsstovnar, at øll elektroniskt skrásett skjøl vórðu goymd uttan tíðaravmarking, og at hetta varð gjørt eftir boðum frá Føroya Landsskjalasavni.

Dátueftirlitið heitti á Føroya Landsskjalasavn um at greiða frá, hvussu stovnurin vegleiddi við atliti at strikan av persónsupplýsingum, og um ásetingin í § 8 í persónsupplýsingalógini varð havd í huga í hesum sambandi.

Eftir at Dátueftirlitið hevði verið á fundi við Føroya Landsskjalasavn, var greitt, at ongar greiðar mannagongdir vóru á økinum. Eisini var greitt, at kunngerð nr. 117 frá 5. juli 1995 um almenn savnindi og virksemið hjá Føroya Landsskjalasavni tørvaði at verða dagførd.

Eftir nógv samskifti við stovnin heitti Dátueftirlitið á Mentamálaráðið um at dagføra nevndu kunngerð. Vegna vantandi samsvar millum persónsupplýsingalógina og lógarverkið, sum stovnurin virkaði eftir, valdaði ógreiða og ivi í sambandi við strikan av persónsupplýsingum hjá almennum stovnum.

Mentamálaráðið boðaði fyrst í 2016 frá, at ráðið alt fyri eitt fór undir at fáa viðurskiftini í rættlag.

### 4.1.6. NemID hjá bankunum

Eftir at Dátueftirlitið varð kunnað um, at bankarnir høvdu ætlanir um at stovna allar sínar netbankakundar sum kundar í Nets, soleiðis at kundarnir skuldu rita seg inn við NemID, setti eftirlitið seg í samband við bankarnar. Vórðu ætlanirnar framdar í verki, bar tað í sær, at p-tølini hjá kundunum vórðu flutt til Danmarkar, har fyritøkan Nets er skrásett.

Dátueftirlitið minti bankarnar á, at heimildin mátti vera í lagi. Bankarnir hava ymiskar lógarheimildir at skráseta persónstøl hjá kundunum, men sambært § 8 í persónsupplýsingarlógini er ikki loyvt at brúka innsavnaðar upplýsingar til endamál, sum ikki samsvara við tað upprunaliga endamálið við innsavnanini. Ongin lógarheimild er til, at bankar kunnu nýta p-talið til NemID. Tískil kravdist samtykki frá hvørjum einstøkum kunda.

Eftir samskifti í málinum um, hvussu hetta kundi fremjast í verki, sleptu bankarnir at enda kravinum um NemID. Hetta bar í sær, at kundarnir kundu rita seg inn í netbankan sum áður. Kundarnir kundu tó sjálvbodnir – tað vil siga við samtykki - velja at nýta NemID í staðin fyri verandi innritan.

### 4.1.7. Mál um trygd í sambandi við heimasíður hjá læknum

Spurningurin um at flyta viðkvæmar persónsupplýsingar um alnetið hevur verið afturvendandi í 2015. Sum dømi verða her nevnd tvey mál.

Dátueftirlitið varð gjørt varugt við, at borgarar, sum nýttu eina ávísa kommunulæknaviðtalu, kundu bíleggja sær tíð til læknaviðtalu á heimasíðuni hjá læknanum. Borgarin varð biðin um at skriva navn, persónstal og fartelefonnummar og kundi eisini skriva eina viðmerking, sum kundi fevna um viðkvæmar persónsupplýsingar, í hesum føri upplýsingar um heilsustøðu. Borgarin varð biðin um at vátta, at hann hevði lisið um trygdina á heimasíðuni.

Sambært trygdarkunningini á heimasíðuni varð alt, sum varð sent um heimasíðuna, ssl-krypterað.

Læknaviðtalan fekk boð um at greiða Dátueftirlitinum frá trygdini á heimasíðuni og hvussu samskiftið varð krypterað.



Ávís útvald mál í 2015

Læknaviðtalan svaraði, at samskiftið á heimasíðuni fór ígjøgnum ein eksternan veitara í USA.

Dátueftirlitið kunnaði læknaviðtaluna um, at tá ið talan er um at flyta persónsupplýsingar av landinum, skal Dátueftirlitið kunnast um viðgerðina.

Læknaviðtalan takkaði fyri, at Dátueftirlitið hevði gjørt vart við, at trygdin á heimasíðuni ikki var í lagi, og lovaði at rætta feilin.

Eftir drúgt samskifti um, hvussu læknaviðtalan kundi fáa eina trygga loysn til heimasíðuna, eru tær neyðugu broytingarnar nú framdar í verki, soleiðis at ætlanin um at senda persónsupplýsingar til útlond varð slept, og í staðin varð funnið fram til eina loysn, har persónsupplýsingarnar verða hýstar í Føroyum. Tað er nú púra trygt at nýta heimasíðuna.

Ein annar fyrispurningur kom frá eini kommunu, sum hevði fingið eitt tilboð frá einum veitara um at gera læknaviðtaluni í kommununi eina heimasíðu. Kommunan vildi hava Dátueftirlitið at hyggja at tilboðnum frá veitaranum fyri at tryggja sær, at heimasíðan varð trygg at nýta.

Dátueftirlitið hugdi at tilboðnum og viðmerkti, at einki í tí var ímóti persónsupplýsingalógini.

### 4.1.8. Kæra um Almannaverkið

Ein kvinna setti seg í samband við Dátueftirlitið í sambandi við, at hon hevði latið Almannaverkinum eina umsókn um fyritíðarpensjón, sum hon seinni hevði angrað og viljað tikið aftur.

Kvinnan hevði í hesum sambandi heitt á Almannaverkið um at strika eina serlæknaváttan, sum Almannaverkið hevði biðið hana fáa til vega í sambandi við umsóknina.

Av tí at Almannaverkið noktaði at strika váttanina, vildi kvinnan kæra Almannaverkið. Dátueftirlitið sendi síðani kæruna til hoyringar hjá Almannaverkinum.

Dátueftirlitið gjørdi Almannaverkinum greitt, at stovnurin sambært persónsupplýsingalógini ikki hevði heimild at goyma persónsupplýsingarnar hjá kæraranum, tí ongin orsøk er til at varðveita hesar, tá málið er tikið aftur og øll viðger harvið er steðgað. Fyri at goyma slíkar upplýsingar krevjast greiðar lógarheimildir, sum koma fram um persónsupplýsingalógina, um umrødda varðveiting skal vera lóglig. Tí varð heitt á Almannaverkið um at vísa Dátueftirlitinum á, hvørjar heimildir stovnurin hevði at goyma upplýsingarnar.

Almannaverkið kom hereftir til ta niðurstøðu, við støði í grundgevingunum hjá Dátueftirlitinum, at persónsupplýsingarnar skuldu strikast, tí ongin serstøk lógarheimild finst, og tí at stovnurin onga sakliga grundgeving hevði fyri at goyma upplýsingarnar um kæraran. Almannaverkið metti tó, at tað sambært rokskaparreglum landsins og vegleiðing um rokskaparreglugerðir var neyðugt at goyma eina rokning frá serlækna sum prógv fyri, at rokningin var rindað. Allar aðrar upplýsingar skuldi Almannaverkið strika sum skjótast.

Almannaverkið kom hereftir til ta niðurstøðu, við støði í grundgevingunum hjá

Dátueftirlitinum, at persónsupplýsingarnar skuldu strikast, tí ongin serstøk lógarheimild finst, og tí at stovnurin onga sakliga grundgeving hevði fyri at goyma upplýsingarnar um kæraran. Almannaverkið metti tó, at tað sambært roknskaparreglum landsins og vegleiðing um roknskaparreglugerðir var neyðugt at goyma eina rokning frá serlækna sum prógv fyri, at rokningin var rindað. Allar aðrar upplýsingar skuldi Almannaverkið strika sum skjótast.

Almannaverkið váttaði seinni, at øll skjøl, uttan nevnda rokning, vóru strikað úr skipanini.



### 4.1.9. Gudstænastustroyming

Av og á fær Dátueftirlitið fyrispurningar frá kirkjum í sambandi við ætlanir um at seta stroymingarútbúnað upp, sum ger tað møguligt at stroyma gudstænastur á netinum.

Ein kirkja vildi vita, hvat tey serliga skuldu hava í huga í hesum sambandi.

Dátueftirlitið vísti á, at tað er ein treyt fyri loyvi til at seta vakmyndatól upp, at tólini bara verða nýtt til tað fráboðaða endamálið og annars bara verða nýtt samsvarandi reglunum í persónsupplýsingalóggávuni. Hetta merkir millum annað, at upptøkurnar skulu verða gjørdar soleiðis, at tær í minst møguligan mun verða gjørdar av kirkjufólkinum, og um ikki heilt slepst undan hesum, skulu upptøkur verða gjørdar soleiðis, at ikki ber til at kenna fólk aftur, t.d. við at vísa á baki. Ein treyt er, at eitt myndauppslag verður hongt upp í kirkjuni, sum kunnar um, at guðstænastan verður stroymd. So kunnu kirkjufólk, sum vilja tað, seta seg á beinkir, har ið ikki sæst í nakkan á teimum. Á sama stað í kirkjuni skal eisini eitt skjal, sum prestur og kirkjutænararnir sum starvsfólk skulu skriva undir, heingjast upp. Við at skriva undir samtykkja prestur og kirkjutænararnir at taka lut í gudstænastuni, hóast myndir av teimum verða stroymdar á netinum, meðan teir eru til arbeiðis. Uttan samtykki frá starvsfólkunum í kirkjuni er ikki loyvt at stroyma myndir á netinum.



### 4.1.10. Luttøka á panelfundum

Tvær ferðir í 2015 var Dátueftirlitið eftir áheitan við á panelfundum.

Øðrum fundinum skipaði Almannaverkið fyri í sambandi við 40 ára føðingardagin hjá stovninum. Heitið á tiltakinum, sum var skipað sum ein kjakfundur, var: "GPS-tøkni og óhjálpin fólk – frælsi, etikkkur og heimildir".

Við á fundinum vóru Dátueftirlitið, Almannamálaráðið, Ríkisumboðið og umboð fyri avvarðandi. Luttakararnir høvdu hvør sína framløgu við støði í síni servitan.

Nógv varð tosað um, at eingin serlóg er á økinum, og at tey óhjálpnu tí ikki eru serliga væl vard. Eitt nú ber ikki lógliga til at seta GPS'ara á dement fólk, so at til ber at skráseta, hvar tey eru. Hetta hevði í summum førum kunnað givið sálarliga óhjálpnum tiltrongt frælsi til at fara ein túr einsamøll. Men sambært galdandi rætti her á landi er ikki loyvt at seta GPS'ara á fólk uttan kunnað samtykki frá teimum. Tá ið ein er vorðin dementur ella sálarliga óhjálpin annars, og ikki er førur fyri at geva kunnað samtykki sambært persónsupplýsingalógini § 2, nr. 8, kann ein ikki geva lógligt samtykki.

Í øðrum londum eru serlógir, sum áseta, hvussu farast skal fram í slíkum serligum førum.Dátueftirlitið hevur áður, og aftur á sumri 2015, vent sær til Almannamálaráðið hesum viðvíkjandi og heitt á ráðið um at gera eina sokallaða tænastulóg fyri at bøta um rættartrygdina hjá teimum óhjálpnu. Hetta lógararbeiðið er, sum skilst, sett í verk.

Nevnast kann, at sportøknin sum heild er í støðugari menning. Tí er tað umráðandi, at samfelagið ger sær greitt, hvørjir møguleikar eru, og um, og í játtandi føri hvussu, henda tøknin kann verða nýtt.

Hinum fundinum skipaðu TAKS og Formula fyri. Við á fundinum vóru almennir, kommunalir og privatir stovnar, og tiltakið snúði seg um journalskipanir. Dátueftirlitið hevði eina framløgu, sum snúði seg um persónsupplýsingalógina og undir hesum strikan av persónsupplýsingum.

Strikan av persónupplýsingum hevur verið nógv umrødd í 2015. Stórur tørvur er á, at økið verður skipað á nøktandi hátt. Fleiri almennir stovnar hava vent sær til Dátueftirlitið, tí stórur ivi er um, hvussu og nær persónsupplýsingar eiga at verða strikaðar. Hetta varð eisini umrøtt á hesum fundinum. Evnið er eisini umrøtt aðrastaðni í hesi frágreiðing.

Sambært persónsupplýsingalógini skulu persónsupplýsingar goymast soleiðis, at tað ikki ber til at eyðmerkja tann skrásetta longur enn neyðugt í mun til endamálið við viðgerðini. So skjótt sum tað ikki longur er neyðugt í mun til endamálið at kunna eyðmerkja tann skrásetta, skulu tær innsavnaðu persónsupplýsingarnar strikast ella navnloynast.

Neyðugt er at dagføra skjalasavnslóggávuna og kunngerðir. Dátueftirlitið hevur vent sær til Mentamálaráðið hesum viðvíkjandi. Sambært Mentamálaráðnum verður nú arbeitt við at bøta um hesi viðurskifti.

## 4.2. MÁL TIKIN UPP AV EGNUM ÁVUM

Sambært § 37, stk. 1, nr. 1, í persónsupplýsingalógini hevur Dátueftirlitið heimild at taka mál upp av egnum ávum. Hetta gjørdi Dátueftirlitið í fleiri førum í 2015.

Harumframt framdi Dátueftirlitið sokallað skriviborðseftirlit.

# 5 Altjóða samstarv

Eitt, sum eyðkennir londini rundan um okkum, tá ið talan er um vernd av persónsupplýsingum, er víðfevnt altjóða samstarv. Av tí at persónsupplýsingar ofta verða fluttar um landamørk, hevur slíkt samstarv stóran týdning.

Tey flestu grannalondini hava, eins og Føroyar, eina persónsupplýsingalóg, sum er grundað á ES-fyriskipan 95/46EF um vernd av likamligum persónum í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum og um frítt skifti av persónsupplýsingum millum lond. Meginreglan í hesi fyriskipan er, at ein viðgerð skal vera í samsvari við grundleggjandi persónsverndaratlit sum persónsfrælsi og heimafrið hjá tí einstaka. Viðgerð av persónsupplýsingum skal eisini virka til frama fyri økta trygd hjá tí einstaka.

Sambært EU er fortreytin fyri at persónsupplýsingarøkið virkar væl, at dátueftirlitini í limalondunum og í teimum londum, sum EU góðkennir sum trygg 3. lond, eru skipað sum fyrisitingarliga óheftir stovnar.

Viðvíkjandi tí at flyta persónsupplýsingar millum lond býtir ES-lóggávan londini upp í limalond og triðjalond. Persónsupplýsingar kunnu flytast millum limalondini í Evropasamveldinum, tí londini eru á sama trygdarstigi. Triðjalond hevur ES-nevndin býtt upp í trygg og ótrygg triðjalond. Trygg triðjalond eru lond, sum megna at veita eins góða trygd fyri persónsupplýsingar og ES-londini. Á heimasíðuni hjá ES-nevndini er ein listi yvir triðjalond, sum eru góðkend sum trygg triðjalond. Rættiliga strangar treytir eru fyri flutningi av upplýsingum til triðjalond, sum ikki hava slíka góðkenning.

Í eini kunngerð, sum Innlendismálaráðið setti gildi í 2005, er ásett, at flutningur av persónsupplýsingum til øll ES-lond og londini, sum ES-nevndin hevur lýst sum trygg triðjalond, ikki krevur loyvi frá Dátueftirlitinum. Dátueftirlitið skal kortini kunnast um slíkan flutning. Føroyar hava á henda hátt, eins og ES, góðkent øll ES-londini umframt lond, sum ES hevur lýst sum trygg triðjalond.

## 5.1. TRIÐJALANDSGÓÐKENNING FRÁ ES NEVNDINI

Innlendismálaráðið heitti í 2005 á ES-nevndina um at góðkenna Føroyar sum trygt triðjaland í persónsupplýsingahøpi. Síðan hevur verið arbeitt við málinum, og í 2010 komu boðini um, at ES-nevndin hevði góðkent Føroyar sum trygt triðjaland.

Dátueftirlitið fegnast um ES-góðkenningina, sum í høvuðsheitum merkir, at ES metir trygdarstøðið í Føroyum við atliti at persónsupplýsingum vera á jøvnum føti við trygdarstøðið í ES-londum. Hetta merkir samstundis, at ES viðurkennir Føroyar sum eitt land, sum verjir grundleggjandi fólkarættislig rættindi í einum nútímans talgildum samfelag.

Triðjalandsgóðkenningin ber í sær, at Føroyar koma á listan yvir trygg triðjalond millum lond sum Ísland, Noreg og Sveis. Góðkenningin fær stóran týdning fyri tað føroyska samfelagið og fer at gera tað lættari hjá føroyskum fyritøkum, eitt nú peningastovnum, at samskifta við útheimin.

Góðkenningin fær somuleiðis týdning fyri gransking og ætlanirnar at fáa útlendskar granskarar til Føroya at granska, fyri møguleikan hjá føroyskum fyritøkum at marknaðarføra seg uttanlands og fyri ætlanirnar at bjóða Føroyar fram sum altjóða hýsingarmiðdepil.

Avgerðin um at góðkenna Føroyar sum trygt triðjaland fekk gildi tann 15. juni 2010.

Í desember 2015 samtykti ES eina nýggja persónsupplýsingafyriskipan. Enn er ikki greitt, júst hvørjar broytingar hetta ber í sær fyri persónsupplýsingarrættin í limalondunum og Føroyum. Danska løgmálaráðið hevur sett ein bólk av serkønum at seta út í kortið, hvussu økið skal skipast, tá ið fyriskipanin eftir ætlan fær gildi á vári/sumri 2018. Dátueftirlitið fylgir við á økinum og fer at mæla Løgmansskrivstovuni til at gera tær tillagingar á persónsupplýsingaøkinum, sum møguliga verða neyðugar í mun til ta nýggju fyriskipanina.

101010



ANNIJANNI

Dátueftirlitið

Dátueftirlitið verjir tínar persónsupplýsingar

www.dat.fo